# Fyrispurningur um bingjuhavn á Signabø



*Nógv stíð hevur verið um bingjuhavnina á Signabø. Heidi Petersen, løgtingskvinna, vil hava at vita, hvør hevur eftirlit við ásetingum, sum Yvirfriðingarnevndin setir í samband við havnabyggingar*

Løgtingskvinnan hjá Tjóðveldinum, Heidi Petersen, vil hava Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinnu í løgmálum, at svara fyrspurningi um Yvirfriðingarnevndina, ið serliga snýr seg um bingjuhavnina á Signabø. Fyrispurningurin er í hesum trimum pørtum:

1. Hvør kannar og hevur eftirlit við, at ásetingarnar verða fylgdar, sum Yvirfriðingarnevndin setir í sambandi við eitt nú havnabyggingar, eftir at arbeiðið er farið í gongd?
2. Á hvønn hátt er eftirlitið við byggingini av bingjuhavnini á Oyrareingjum framt, hvussu ofta og av hvørjum?
3. Er uppfylgingin av ásetingunum hjá Yvirfriðingarnevndini til byggimál nøktandi, og eru ætlanir um at gera nakrar broytingar hesum viðvíkjandi?

Í viðmerkingunum skrivar Heidi Petersen soleiðis:

Fyrispurningurin er fyrst og fremst ein generellur spurningur um eftirlit og uppfylging av ásetingunum, sum friðingarmyndugleikarnir seta í sambandi við byggimál.

Annars verður eisini settur ein ítøkilgur spurningur um júst uppfylgingina av ásetingunum, friðingarmyndugleikin setti í sambandi við bygging av bingjuhavn á Oyrareingjum.

Haldi, tað hevur almennan áhuga at vita, hvussu hesi viðurskifti, friðingarmyndugleikin hevur avgerðarrætt á, verða skipað og útint í verki.

Tað veri seg, tá lands-, kommunal- ella privat byggimál eru viðgjørd av friðingarmyndugleikunum, og myndugleikin hevur ásett treytir fyri byggingini, sum skulu fylgjast, at borgarin so veit, at málið liggur í tryggum hondum, og at tað eru kvalifiserað fólk, sum fylgja málunum upp, skrivar tingkvinnan hjá Tjóðveldinum í fyrispurninginum.

**kári**


## Umboðsráðsval 2008

### Valúrslit fyri Umboðsráðið í Ognarfelag Tryggingartakaranna

**Teir 11 nývaldu umboðsráðslimirnir eru:**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Ingeborg Godtfred | 847 |
| 2 | Emil Jacobsen | 474 |
| 3 | Dánjal Jakobsen | 405 |
| 4 | Jákup Oluf á Lakjuni | 310 |
| 5 | Árni Jakobsen | 301 |
| 6 | Jákup Egholm Hansen | 279 |
| 7 | Ólavur Samson | 269 |
| 8 | Hallur Thomsen | 231 |
| 9 | Ronald F. Poulsen | 230 |
| 10 | Jóhannus Danielsen | 222 |
| 11 | Marin í Dali | 218 |

**Valskeið**

Valið er galdandi í fýra ár og valskeiðið er at rokna frá d.d.

Víst verður til lýsing í bløðunum um miðjan februar um val til umboðsráðið fyri Ognarfelag Tryggingartakaranna.

Tórshavn, 1. mars 2008
**Ognarfelag Tryggingartakaranna**
**Stjórnin**

www.sansir.fo

OGNARFELAG TRYGGINGARTAKARANNA

Kongabrúgvin · Postboks 329 · FO-110 Tórshavn
Tel 345600 · Fax 345601 · tf@trygging.fo · www.trygging.fo


